Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jóhannis Joensen, løgtingsmaður

Svarari: Høgni Hoydal, landsstýrismaður í uttanríkis- og vinnumálum

Evni: Føroyska rossið

Spurningar:

1. Ynskir landsstýrismaðurin at varðveita føroyska rossið?
2. Ætlar landsstýrismaðurin at skipa lógarverkið soleiðis, at til ber at útflyta føroyska rossaslagið, soleiðis at lættari er at varðveita slagið?

Viðmerkingar:
Málið um føroyska rossið hevur verið til viðgerðar fleiri ferðir í miðlunum. Tað eru uml. 80 ross eftir av føroyska slagnum. Hetta merkir, at vandi er fyri at føroyska rossið doyr út. Um ikki lógarverkið verður snikkað til at loyvi verður at ala aðra staðni enn í Føroyum, er vandin størri. Innannøring kann gerast ein avbjóðing.
Eisini liggur ein stór byrða á áhugaðum í Føroyum, at tað bara er teirra uppgáva og ábyrgd at varðveita føroyska rossið.
Spurningurin er, um hetta ikki eisini er ein uppgáva fyri føroyska samfelagið, eins og vit vilja varðveita føroyska bátin, dansin, sangin v.m.
Í dag loyvir lógarverkið ikki aling av føroyska rossinum úti í heimi. Tí verður hesin fyrispurningur settur landsstýrismanninum.

Á Løgtingi, 17. mai 2023

Jóhannis Joensen